## Henry havnar New York

Nú franski landsliðsspælarin, Thierry Henry, ikki hevur fingið ta bestu byrjanina í kappingarárinum fyri spanska FC Barcelona, hevur hann verið settur í samband við amerikanska felagið, New York Red Bulls. Men Henry sjálvur vil ikki kennast við nakað skifti av slíkum slagi, men vísir á, at hann er bundin til FC Barcelona fram til 2011.



## Guti fer ongan veg

Tað hevur leingi ljóðað, at miðvallarspælarin, Guti, skuldi vera á veg frá Real Madrid, men nú sigur hann seg hava tikið avgerð um, at hann verður verandi í spanska høvuðsstaðarfelagnum, har hann altíð hevur spælt. Guti, sum er 33 ára gamal, forvinnur yvir hálvafjórði millión krónur um árið, og tað verður hildið at vera ein orsøk til, at hann ikki hevur hug at skifta felag kortini.

Fleyr-ÍF 3-1 (25-22, 25-13, 21-25, 25-20):

# Framvegis tungt hjá ÍF



Fleyr mátti í gjár geva ÍF eitt sett, áðrenn 3-1 sigurin á heimavølli í Gundadalshøllini var komin til høldar

Mynd: Álvur Haraldsen

**Hóast fuglfirðingar í gjár vunnu eitt sett, so munaði tað ov lítið ímóti Fleyr, ið hevði munin samanlagt, hóast talan var um enn eitt svingandi avrik hjá heimaliðnum**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen


Fleyr er framvegis fýra stig aftan fyri SÍ og fimm stig aftan fyri Mjølnir, nú liðið hevur fýra dystir eftir at spæla, so enn er teoretiskt ikki avgjørt, hvør kemur í FM-finaluna hjá monnunum. Men hóast Fleyr enn eina ferð gjørdi sítt og vann, so er ivasamt, um tað fer at røkka til meiri enn bronsu í ár, tí munurin upp til hini bæði liðini er ov stórur – og írestandi dystirnir ov fáir, til at nakað kann gerast við tað.

Í gjár var ÍF á vitjan í Gundadalshøllini í Havn, og her vísti tað seg enn eina ferð, at tað er øgiliga tungt hjá fuglfirðingum at gera seg galdandi. Teir eru tað verri enn hini trý liðini, og sjálvt um teir í ÍF stríðast væl og fáa nokk so nógv uppaftur, røkkur tað bara ikki í avgerandi løtunum.

So var eisini í gjár, har ÍF byrjaði øgiliga væl í fyrsta setti og eitt skifti sá út til at vinna tað. Støðan var 16-8, men so eydnaðist ikki at fara allan vegin allíkavæl, tí Fleyr fekk bart seg innaftur í dystin og endaði við at vinna settið við trimum stigum. Skelkurin stóð so mikið fastur, at annað sett fyri tað mesta var einvegis ferðsla, og Fleyr vann tað lætt og sannførandi.

Men í triðja setti raknaði ÍF við aftur og fekk í longum løtum fatur í rætta endanum. Sigast skal tó, at Fleyr nú gjørdi onkrar útskiftingar og gav yngri spælarum møguleikan, men tað tekur einki frá ÍF, ið megnaði at halda á til tað síðsta, samstundis sum Fleyr ongantíð ordiliga slapp framat.

Hóast tað eydnaðist ÍF at fáa vunnið eitt sett, bar heldur ikki nú til at halda fast, og í fjórða setti gjørdist tað ongantíð spennandi. Fleyr, sum í løtum í undanfarnu settunum hevði havt ov svingandi avrik, var nú á odda allan vegin og koyrdi settið heim, og harvið var 3-1 sigurin eisini tryggjaður.

KÍF-Mjølnir 0-3 (10-25, 10-25, 13-25):

# Einvegis ferðsla

Kvinnurnar hjá Mjølnir settu ikki ein skeivan fót, tá tær í gjár spældu á útivølli í Kollafirði ímóti KÍF. Allar, sum vóru við, sluppu at spæla, og onkra løtuna var talan um einar fýra broytingar á liðnum, samanborið við, hvussu tað plagar at síggja út.

Í ongum av teimum trimum settunum var nakar ivi, og hóast unga KÍF-liðið onkuntíð fyrr í kappingini hevur fingið mannað seg so mikið upp, at tað hevur borið til at argað betru liðini, var einki at gera hesa ferð.

Við sigrinum er Mjølnir framvegis væl við í kappingini um FM-finaluupláss í Eik-liguni hjá kvinnum, hóast tað kanska ikki hóskar teimum so væl, at TB, ið liggur eitt pláss frammanfyri, eisini tykist hava góðan vind í seglunum.

hil

Fleyr-ÍF 3-0 (25-11, 25-17, 25-20):

# So vendi hjá Fleyr

Synd er at siga, at serliga væl hevur gingist Fleyr-kvinnunum í síðstuni. Fyrst taptu tær finaluna í Mjølnir-kappingini og eftirfylgjandi hálvfinaluna í steypakappingini, umframt at tær so aftur taptu, tá tær síðsta sunnudag spældu Eik-liguдyst í Klaksvík.

Men í gjár kom vend í, tá Fleyr heldur lættliga vann á ÍF, ið framvegis ikki megnar at gera nakað við liðini, ið liggja omanfyri. Lukkan hjá ÍF er kanska, at eitt lið er niðanfyri, og at bara liðið heldur seg framman fyri KÍF, so gongur tað nokk.

Í gjár var tað annars ikki nógv, ið gekk hjá ÍF tey bæði fyrstu settini. Í fyrsta setti legði hevarin hjá Fleyr, Rakul Dalsgaard Jacobsen, fyri við einari so mikið góðari servurundu, at støðan var 12-0, áðrenn ÍF vann sín fyrsta bólt. Fleyr vann settið trygt, og hóast liðini í øðrum setti fylgdust eina løtu, fór Fleyr avstað til endans og vann trygt.

Øðrvísi var í triðja setti, ið var besta løtan hjá ÍF. Kvinnurnar úr Fuglafirði vóru eitt og tvey stig á odda ta longu fyrstu løtuna, men tá tær vóru komnar upp á 12-10, kom Fleyr av álvara fyri seg og streyk avstað við settinum og sigrinum.

Fyri Fleyr hevði sigurin sjálvandi týdning fyri sjálvsálitið, og so fæst at vita mikukvøldið, um hetta var vendin hjá havnarkvinnunum. Tá skulu tær til Sørvágs at spæla ímóti SÍ, ið framvegis er á odda eftir tap í Trongisvági og hálvering av stigunum á stigatalvuni.

hil



**Tað hevur gingið striltið hjá Fleyr-kvinnunum seinastu vikurnar, men í gjár bragdaði, tá tær vunnu tryggan sigur á ÍF**

Mynd: Álvur Haraldsen